Vikuskiftis Sosialurin

Nr. 220 - 14. november 2008

# Barnaverndarsamstarvið í Suðuroy

SØLVI ANDREASEN
formaður sosialunevnd



Mangur situr uttan iva spyrjandi um, hví slitnaði samstarvið millum Vág-Porkeri og hinar kommunurnar í Suðuroy. Fyri at lýsa hesum, vil undirritaði eftur bestu sannføring geva eina lýsing av hesum.

Tað stóð fyri framman, at endurnýggja sáttmálan komandi 4 árini. Undirritaði, ið er formaður fyri b arnaverndarsamstarvinum, heitti tí á barnaverndarleiðaran, um at geva okkum eina frágreiðing, um hvussu barnaverndarsamstarvið hevði fungerað hesi 3 árini, samstarvið hevði verið.

Barnaverndarleiðarin gav okkum í juni mánaði eina frágreiðing um barnaverndarsamstarvið, undirritaði kannaði beinanvegin, um møguleiki varð at viðgerða frágreiðingina undan summarferiuni, men frágreiðingin kom so seint í juni, at fólk vóru byrjaði upp á summarferiuna. Undirritaði kannaði so, nær best lá fyri hjá fólki, at koma saman fyri at viðgerða frágreiðingina, hettar lat seg ikki gera fyrrenn í september. Fundur varð tí avtalaður í septembur, við tí eina máli, at viðgerða frágreiðingina.

Vikuna áðrenn fundin vóru boð við áminning um fund, givin av barnaverndarleiðaranum. Allar kommunur møttu til fundin uttan Tvøroyrar kommuna og Fámjins kommuna. Til henda fund gjørdu vit Porkeri/ Vágur, vart við at vit vóru sera ónøgd við ymiskt í frágreiðingini. Vit vístu eisini á, at sumt var í frágreiðingini, sum als ikki hoyrdi heima har, hettar var alt bagatellisera av barnaverndar leiðaranum.

Vit tóku fundin uppaftur ein mánað seinni, fyri at koma nærri ársfrágreiðingini. Í ársfrágreiðingini stóð at lesa, at samstarvið hjá barnaverndarumsitingini við allar stovnar var sera gott, hesum høvdu vit frænir um, at tað als ikki passaði. Vit kallaðu tí allar stovnar í Vágs/Porkeris kommunum (uttan barnagarðin, har leiðarin var burturstaddur) inn til fundar, har greitt var frá, at vit sótu fyri, at viðgerða barnaverndarsamstarvið sum vit skuldu til at endurnýggja, og í hesum sambandi ynsktu vit, at frætta hvat var gott og um okkurt var sum tey ynsktu, at fáa betra. Úrslitið av fundinum var sera negativt, har øll høvdu negativar viðmerkingar, ja so negativar, at als einki álit var millum stovnsleiðarar og barnaverndarleiðaran. Formaðurin í barnaverndini, sum var við á fundinum var sera skelkað av upplýsingunum.

Úrslitið av fundinum var, at vit Vágur/Porkeri ynsktu, at hinar kommunurnar saman við okkum søgdu barnaverndarleiðaran úr starvið og at barnaverndarumsitingin varð løgd út um skrivstovuna hjá Tvøroyrar býráð. Vit ynsktu at kommunurnar svaraðu okkum aftur.

Tvøroyrar kommuna svaraði aftur, at tey høvdu fult álit á barnaverndarleiðaranum og at tey ikki høvdu ætlanir um at leggja barnaverndarumsitingina út um býráðsskrivstovuna. Fámjins kommuna svaraði munnlig aftur, at tey høvdu ikki trupulleikar, við samstarvinum. So vítt eg veit, hava hinar kommunurnar ikki svara aftur.

Vit sum politikkarir í Porkeri/Vágur, skulu altíð veita borgarunum okkara bestu tænastu. Tað kundu vit ikki í hesum føri, tí valdu vit at siga barnaverndarsamstarvið upp. Og vilja vit ístaðin stovna okkara egnu barnaverndartænastu, har vit veita brúkarunum og avvarðandi bestu tænastu. Og tað eru vit sannførd um, at vit megna, við teimum ætlanum vit hava.

Hettar er so skriva í bestu sannføring og uttan at seta niður á nakran, í dagbløðunum hava vit sæ, at formaðurin í barnaverndini, sigur at samstarvið í barnaverndini, hevur verið sera gott og tað ivist eg onga løtu í, at so er. Men tað er ikki tað, ið málið snýr seg um, men hinvegin tænastan til okkara. Vit Vágur rindar sum er, góða millión fyri hesa tænastuna, sum stovnsleiðarar okkara ikki kunnu nýta.

Vinarliga, við kvøðu um eitt gott væl til øll sum stilla upp í oynni.

Og somuleiðis tøkk til øll, sum hava stuðla meg í býráðsarbeiðinum hesi ár, eg havi verið virkin. Gud signi tykkum øll og føðiland okkara.

# Ongin fer væl av at annar fer illa

JÁKUP DANIELSEN



**Ein heilsan til landsfund Javnaðarfloksins, sum er í Klaksvík um vikuskifti**

Síðani síðsta landsfund hava verið ymiskar politiskar rembingar verið, og frá at hava løgmann hevur flokkurin nú fingið sera týdningarmikla landsstýrismannin í fíggjarmálum. Umframt hendan sessin hevur flokkurin eisini landsstýriskonuna í mentamálum og landsstýrismannin í heilsumálum.

Hesin síðst nevndi sessurin hevði eg persónliga ynskt var skiftur um við almannamál, tí tað á júst hesum økinum hava vit so nógv at verja og berjast fyri. Vit vita, at hetta øki hevur verið væl røkt av Hans Paula, og at hann hevur brent fyri sakini, men eitt sindur óvart var tað at hoyra, at almannamálini ikki fingið ta rúmd í síðstu løgmansrøðini, sum tey høvdu uppiborið.

Eg ivist tó ikki í, at Rósa fer væl um almannamálini og hevur eitt hjarta sum brennir fyri tí.

Nøkur grá skýggj reka yvir oyggjarnar í hesum døgum, serliga fyri sunnan og fyri norðan. Eg haldi tað hevði verið skilagott, at stig vóru tikin til, at rætta teimum eina hond, soleiðis at m.a. suðringar og norðingar høvdu møguleikar fyri at gera íløgur í teirra øki. Týdningarmikið er, at hóttafall ikki spjaðir seg og ger tað óliviligt á hesum plássum.

Í hesum sambandi skal nevnast, at eg haldi lítið um seinastu uppsagnirnar av starvsfólki á góðum arbeiðsplássum, bæði í næststørstu kommununi og á stórum "privatum" arbeiðsplássum. Síggja vit burtur frá kommununi, so vita vit, at hesar fyritøkur eru væl fyri fíggjarliga, men her er sum við so nógvum øðrum, at tað hevur størri týdning at lata eigarum síðani størri vinningsbýti enn at taka samfelagslig atlit. Hetta er tað tey kallað fyri rationalisering og onnur líknandi gandaorð. Tey sum missa starvið eru sum oftast tey, sum kunnu hava ringastu møguleikarnar fyri at fáa annað arbeiði.

Eg havi ongantíð verið so neiligur yvir fyri bjargingarætlan landsstýrisins av Smyril Line, tí tað er nú at tað almenna má meta um okkara farleiðir til onnur lond. Slíkar bjargingarætlanir hava verið gjørdar fyrr bæði av Smyril Line og Atlantsflog, og í báðum førum hava ætlanirnar eydnast til fulnar. Í orðaskiftinum um hendan spurning var m.a. sagt, at um so var at Norrøna fór av landinum, so vóru aðrir áhugaðir klárir at taka yvir. Eg veit ikki, um tað er so, men eg undrist yvir, at um prísurin fyri at bjarga Smyril Line var um seksti milliónir, hví so hesir íleggjarnir so ikki bara bjóðaðu seg fram og yvirtóku Smyril Line?

Eg haldi somuleiðis, at útrættaða hondin til íslendska fólkið frá landsstýrinum, við løgmanni á odda var stórsinni og ógvuliga skilagott avstaðfarið. Tað var sera væl hugsað, og ongin ivi er um, at virði í hesum er meiri vert enn pengarnir.

Javnaðarflokkurin – og í hesum førinum - við borgarstjóranum í Tórshavnar kommunu á odda, setti veruliga hvøkk í. Við góðum felagsskapi og við góðari hjálp frá Suðurstreymoyar Javnaðarfelag eru nú ikki færri enn fimm fólk – tríggjar kvinnur og tveir menn – sum mynda flokkin í býráðnum.

Vit kunnu saktans verða nøgd. Eg ynski tykkum ein góðan landsfund.

# Ein onnur tíð

SÍMUN PAULI JACOBSEN



Ja, nú er ein onnur tíð. Ein tíð við stúran og ótta. Ein tíð, sera ólík flest øðrum tíðarskeiðum í nýggjari tíð.

Menniskjur í hópatali - ið gjøgnum fleiri ártíggjur hava gjørt eitt dygdargott arbeiði - verða søgd úr starvi uppá standandi fót, ella við uppsagnartíð uppá nakrar mánaðar.

**Vit kunnu taka úr rúgvuni:**

• Starvsfólk á Strandfaraskipum landsins.
• Starvsfólk á Postverki Føroya.
• Starvsfólk á Føroya tele.
• Starvsfólk í Føroya Banka.
• Starvsfólk í Klaksvíkar kommunu og so framvegis.

Og júst í skrivandi løtu skuldi løgtingið fara undir viðgerð av umsókn frá Smyril Line um stuðul uppá 30 milliónir krónir til Norrønu, sum er í fíggjarligari trongstøðu.

Men tá viðgerðin byrjaði í løgtinginum kl. níggju um kvøldið, trein ein løgtingslimur á røðarapallin og nýtti so gott sum alla talutíð sína at viðgera landsstýrismannin Jóhan Dahl.

Og eg, sum væntaði eina umrøðu av tingmálinum um stuðul til Norrønu og einans fekk eina heldur ódámliga og óhóskandi umrøðu av landsstýrismanninum Jóhan Dahl í útvið einum hálvum tíma í staðin, sløkti fyri lurtitólinum og fór til songar við bøn og ynski um, at meiriluti kundi fáast fyri at veita Smyril Line hesa neyðugu peningaupphædd.

Tá eg so morgunin eftir fekk at hoyra, at umsóknin var játtað, gjørdist eg sera glaður, ikki minst vegna tess, at so var ikki neyðugt at siga tey umleið 200 starvsfólkini úr starvinum.

Føroyar hava júst veitt Íslandi - sum eisini er í stórum fíggjarligum trupulleikum - eina hjálpandi hond við eini peningaupphædd uppá 300 miljónir krónir og er hetta bæði rætt og gott.

Men hava vit ráð at veita Íslandi hesar 300 milliónirnar - og tað hava vit - so hava vit eisini ráð at veita einum so stórum arbeiðsplássi sum Smyril Line og Norrønu 30 milliónir krónir.

Jú, nú er ein onnur tíð og eingin kann klára seg einsamallan í dag - hvørki einstaklingar, kommunur ella einstøk lond. Donsku kommunurnar byrjaðu fyri tíð síðani at leggja saman í stórar eindir, til tess at fáa fíggjarliga orku til peningakrevjandi uppgávur og nú eru føroysku kommunurnar farnar undir líknandi samanlegging í størri eindir, so ráð kann vera at útbyggja skúlaverkið, heilsuverkið, sosialu útbyggingina og so framvegis. Føroysku kommunurnar, sum upprunaliga vóru um 50 í tali, eru nú minkaðar til umleið 30 ella kanska væl tað. Miðað vóru fram ímóti, at kommunurnar skulu minkast til sjey ella níggju.

Hetta var um broytingina innan kommunurnar, men hvussu við teim einstøku londunum.

Taka vit Ísland sum dømi, so er landið komið í fíggjarligan brotasjógv, so tað stendur eftir. Og tað skal vera okkara vón, at landið reisir seg aftur, og at betri tíðir koma aftur, bæði fyri land og fólk.

Men tað tykist, sum ein ávísur røringur er komin millum íslandska fólkið.

Fyri nøkrum døgum síðani var ein kanning gjørd millum íslendska fólkið. Kanningin vísti, at triðji hvør íslendingur hevði umhugsað at flyta av landinum. Kanningin vísti eisini, at helmingurin av teimum ungu millum 16 og 24 ár eisini umhugsaðu at flyta av landinum.

Ein onnur kanning vísti, at um 70% av íslendska fólkinum vildu, at íslendska krónan varð umbýtt við evruna, og at landið skuldi søkja um limaskap í ES.

Men hvussu við okkara egna landi - Føroyar.

Tað er ein óreingiligur veruleiki, at teir 4 fullveldisflokkarnir - Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin, Miðflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin við samtykt hava skorið blokkin so meint í einum, at um henda samtykt ikki var framd, so hevði landið verið umleið 3 milliardir krónir ríkari og kundi hesin peningur verið nýttur til útbygging av samfelagnum ella sum uppsparing til niðurgangstíðir, sum til dømis núverandi støða, har peningatrot er veruleiki í so mongum heimum og virkisfeløgum.

Nú veit eingin, hvussu langt á fullveldisleið fullveldisflokkarnir høvdu farið, um ætlaða fólkaatkvøðan varð framd fyrst í hesi øldini, og loysingin hevði meirilutan. Men tað fer kalt niður eftir rygginum við at hugsa um, hvussu ein møgulig føroysk króna hevði klárað seg í núverandi kreppu.